Álit

í

løgtingsmáli nr. 41/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturrindan av heilsutrygdargjaldi

Jørgen Niclasen, tinglimur, hevur lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 7. november 2025 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 18. november 2025.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Áhugafelagið Antares, felagið Føroyskir fiskimenn uttanlands, landsstýriskvinnuna í figgjarmálum, Ruth Vang, og landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Súsonnu Bertholdsen.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Árni Skaale, Jóhan Dahl og Jaspur Langgaard) hevur hesar viðmerkingar:

Í 10 ár hava persónar, sum av órøttum hava goldið heilsutrygdargjald, verið drignir gjøgnum allar kæru- og dómsmyndugleikar, sum eru á økinum. Allir hesir kæru- og dómsmyndugleikar hava givið persónunum viðhald, sum merkir, at teir hava goldið heilsutrygdargjald av órøttum.

Heldur enn at fylgja dómsavgerðunum velur landsstýrið at leggja uppskot fyri Løgtingið um at afturrinda hetta gjald, løgtingsmál nr. 57/2024. Meirilutin í Løgtinginum samtykti hetta lógaruppskotið. Men lógin tileinkisger dómsavgerðina við at seta nýggja treyt, so ikki øll, sum hava goldið, kunnu fáa aftur.

Landsstýrið væntaði upprunaliga, at lógin fór fevna um umleið 1200 persónar og fór at kosta landinum umleið 22 mió kr. Men í dag síggja vit sjón fyri søgn.

Pr. 17. november 2025 vóru bert 250 umsóknir komnar, har 86 eru avgreiddar. Av teimum avgreiddu umsóknunum hava bert 30 fingið fult viðhald, 36 partvíst viðhald og 20 hava fingið noktandi svar. Upplýst eru fyri nevndini, at higartil hava sostatt bert 66 persónar fingið endurgoldið, og samlaða upphæddin er umleið 2 mió kr.

Lógin avmarkar sera nógv fólk, bæði av nýggjari treyt um endurgjald og at persónarnir sjálvir skulu skjalprógva alt meira enn 10 ár aftur í tíðina.

Nordisk konvention om social sikring ásetur greitt, at persónur ikki skal rinda til sosiala trygging í tveimum londum samstundis. Tað hava umleið 1200 persónar gjørt í mong ár, fyri nógvar í meira enn 10 ár.

Lógin um endurrindan av heilsutrygdargjaldinum ásetur, at um persónur hevur fingið frádrátt í føroyska skattinum av norska inngjaldinum, skal hesin ikki fáa afturrindað gjaldið. Konventiónin nevnir einki um nakran frádrátt, og tykist hendan treyt at vera í ósamsvari við konventiónina.

Ikki nóg mikið við tí; lógin tykist eisini sera órættvís. Føroyskir fiskimenn, sum hava siglt í Norra, eru t.d. sambært Norðurlendsku tvískattaavtaluni bert skattskyldigir í Føroyum. Fyri hesar merkir tað, at teir hava goldið allan skattin í Føroyum, men fáa einki av heilsutrygdargjaldinum, tí inngjaldið í Norra er drigið frá í føroyska skattinum.

Hinvegin hava persónar, sum hava arbeitt hjá norskum arbeiðsgevara, bert verið skattskyldigir í Norra. Tað merkir, at teir ikki hava havt fyri neyðini at trekkja norska Folketrygd frá í skatti í Føroyum. Tað merkir, at hesi, sum ikki hava rindað skatt í Føroyum, fáa alt aftur, meðan persónar, sum hava rindað allan skattin í Føroyum, fáa einki aftur. Hetta heldur meirilutin er sera órættvíst.

Í sambandi við umsóknir eftir galdandi lóg áliggur tað viðkomandi umsøkjara at finna og leggja við øll skjalprógv. Hetta kann ikki verða rímiligt, tí fyri tað fyrsta skal borgarin finna øll skjøl meira enn 10 ár aftur í tíðina, og í øðrum lagi hevur TAKS flestu upplýsingarnar.

Í fyriliggjandi uppskoti verður útvegan av skjølum áløgd TAKS, sum frammanundan hevur upplýsingarnar. Undir nevndarviðgerðini hevur TAKS gjørt vart við, at tey hava allar sjálvuppgávur hjá viðkomandi persónum, og at TAKS hevur atgongd til upplýsingar frá norskum skattamyndugleikum. Men TAKS hevur ikki atgongd til norska Folketrygd NAV. Tí mugu upplýsingar frá Folketrygd NAV fáast til vegar av borgaranum sjálvum.

Tí mælir meirilutin til at broyta hesa áseting í lógaruppskotinum, soleiðis at upplýsingar um inngjald til Folketrygd NAV skulu útvegast av umsøkjaranum sjálvum.

Í vón um at uppskotið verður samtykt ynskir meirilutin eisini at halda fast við, at lógin verður longd til at hava gildi til 1. januar 2027.

Meirilutin setur tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 3 verður § 2, stk. 2 orðað soleiðis:
   "*Stk. 2*. Umsøkjarin útvegar skjalprógv fyri, at hann hevur rindað sosialtrygdargjald í øðrum Norðurlandi sambært Nordisk konvention om social sikring, samstundis sum viðkomandi hevur rindað heilsutrygdargjald í Føroyum."

2. Í § 1, nr. 3 verður aftaná § 2, stk. 2 sum nýtt stk. sett:
   "*Stk. 3.* TAKS útvegar allar aðrar neyðugar upplýsingar."
   Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

<u>Viðmerkingar</u>
Til nr. 1
Sambært broytingini verður tað umsøkjarin sjálvur, ið skal prógva, at hann hevur rindað sosialtrygdargjald í øðrum Norðurlandi, samstundis sum hann hevur rindað heilsutrygdargjald í Føroyum. Hetta kann t.d. vera inngjald til norska Folketrygd NAV.

Til nr. 2
Tað verður framhaldandi TAKS, ið útvegar allar aðrar neyðugar upplýsingar í sambandi við viðgerðina av umsóknini.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Liljan Weihe og Hans Jacob Thomsen) hevur hesar viðmerkingar:

2. mai 2025 varð lógaruppskot um afturrindan av heilsutrygdargjaldi samtykt, aftaná minst 12 ára oyðimarkargongd, har hvørki landsstýri ella Løgting megnaðu at finna nakra loysn uppá henda trupulleika.

Samtykta lógaruppskotið í vár gav heimild til at endurrinda teimum, ið av órottum høvdu goldið heilsutrygdargjald í Føroyum.

Undir nevndarviðgerðini til ítøkiliga uppskotið hevur nevndin fingið upplýst, at 250 umsóknir vóru komnar, tá tað vóru knappir 2 mánaðir eftir til freistina, sum er á nýggjárinum.

Hóast tað sjálvandi kann vera tungt hjá vanliga borgaranum at útvega røttu upplýsingarnar um NAV gjøld frá norskum myndugleikum, hevur TAKS ikki møguleika at útvega hesar upplýsingar, tí sáttmálin millum londini ikki umfatar sosial gjøld.

Tó eru upplýsingar um NAV gjøld einastu upplýsingar, borgarin sjálvur skal útvega, tí TAKS hevur allar aðrar upplýsingar.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 2. desember 2025

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Jaspur Langgaard
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	